# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg havi tosað nógv við fólkini í ÍF, og ætlanirnar har tykjast sera spennandi
Høgni Zachariassen*

# Pál móti OL-vinnaranum

**Pál Joensen verður í dag testaður móti avgjørdu heims-elituni, tá hann svimur 1.500 metra frí í Stockholm**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað verður móti avgjørda heimstoppinum, at Pál Joensen skal royna seg, tá hann í kvøld skal svimja undir liðini av Oussama Mellouli úr Tunis*

Við olympiska meistaranum á 1.500 metrum, Oussama Mellouli, undir liðini á sær, verður mótstøðan hjá føroyska gullfiskinum neyvan størri enn taða sama, tá finalan í World-Cup kappingini, sum í hesum døgum fer fram í Stockholm og Svøríki.

Og sum so verður heldur ikki roknað við, at Pál fer at skala mannin, sum altso verður roknaður sum heimsins besti á teininum.

- Pál er ikki í kappingarformi í løtuni, og tað er Mellouli, so tað verður trupult at nerta hann yvirhøvur. Hjá okkum er meira umráðandi, at Pál toppar, tá EM-kappingin verður á skránni í desember mánaði. Her og nú er málið, at vit svimja eina góða tíð, og tosa vit um plaseringar, so er vónin, at Pál kann koma upp á heiðursmerkjapallin, sigur Jón Bjarnason, venjari, við Rás2.

Saman við Pál Joensen og Oussama Mellouli verður roknað við, at Mads Glæsner úr Danmark, og Robert Margalis úr USA fara at kappast um heiðursmerkini. Og skal metast eftir tilmeldingartíðunum, so stendur Pál seg veikast í hesi kappingini. Hinvegin verður talan hesa ferð um ein Pál Joensen, sum veruliga verður pacaður í harðari kapping, og tí er ikki óhugsandi, at hann kann svimja væl skjótari enn tíðin, sum hann er tilmeldaður undir.

Tíðin hjá Páli er her 14.49,34. Mellouli hevur bestu tilmeldingartíð við 14.34,31, meðan Glæsner og Margalis hava ávikavist 14.45,16 og 14.47,46.

Finalan í 1.500 metra frí verður svomin klokkan 18 føroyska tíð, og á heimasíðuni, www.svimjing.com er leinkja til heimasíðu, har kappingin verður streamað.

# Tvey fjórða pláss í Stockholm

**Bæði Pál Joensen og Elspa Mørkøre gjørdust nummar fýra í World-Cup stevnuni í Stockholm**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Elspa kappaðist í tveimum finalunum í gjár.

Í 50 mera rygg gjørdist hon nummar 7 við tíðini 28,27 sekund, sum var nakað seinni enn tilmeldingartíð hennara.

Betur gekst í 200 metra frí, har Elspa svam teinin í 2.08,73, men hetta rakk akkurátikkitilheiðursmerki, tá Elspa kom á mál sum nummar fýra.

Og úrslitið hjá Pál Joensen á 400 metrum frí var júst tað sama. Pál setti annars føroyskt met, tá hann svam teinin upp á 3.44,07, men tað var ikki nóg mikið. Mellouli úr Tunis var langt fremstur í kappingini, og honum á baki komu týski Paul Biederman og danski Mads Glæsner. Hesin seinasti við tíðini 3.42,79.


*Elspa Mørkøre umboðar Danmark á World-Cup stevnuni*

## Fíggjar-kreppan kann koppa Liverpool

Sambært enskum miðlum er álvarsligur vandi fyri,at amerikonsku eigararnir av Liverpool verða noyddir at selja felagið í næstum. Hetta verður váttað av Keith Harris, sum seinnu árini hevur verið maðurin, sum hevur staðið fyri stóru handlunum við enskum feløgum. Og sum í løtuni roynir at selja eitt nú Everton og Newcastle.

Tom Hicks og George Gillett hava fingið tveir mánaðir til antin at gjalda ella umfíggja skuldina í felagnum, sum í løtuni er upp á 350 milliónir pund – ella knappar fýra milliardir krónur.

Fyri einum ári síðani varð ikki roknað við, at tað fór at elva til trupulleikar at umfíggja skuldina, men altjóða fíggjarkreppan hevur fullkomuliga broytt hesa myndina.

Eydnast tað ikki at um- ella endurfíggja skuldina, kann ein avleiðing vera, at felagið verður noytt at selja fleiri av stóru profilunum í spælarahópinum.

Á vøllinum hevur Liverpool fingið sína bestu byrjan nakran tíð í Premier League, og eru teir reyðu av Anfield í løtuni ájavnir við Chelsea á oddasessinum í deildini.

-mørk